## Íslendingar kunnu missa lodnuna

Hevur íslendski fiskifrøðingurin Ólafur S. Astthórsson rætt, kann tað henda, at lodnan hvørvur úr íslendskum sjóøki., Hagtøl vísa, at í 13 av teimum 20 árunum frá 1984 til 2004 var tann íslendska lodnukvotan oman fyri eina millión tons, men at tað vóru bara 10 av teimum 20 árunum, at íslendingar megnaðu at veiða meiri enn eina millión tons. Ólafur S. Ástthórsson sigur við Fiskifréttir, at hitabroytingar í sjónum hava gjørt, at lodnan er farin longri og longri norður, og at hetta helst fer at halda fram, soleiðis at hon at enda fer úr íslendskum sjógvi. Hinvegin hevur hitin ført meiri makrel í íslendskan sjógv.



# Markleys vanvirðing av útlends



*Teir eru fortørnaðir inn á "systemið", sum fer illa við útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum, Karl Christiansen (t.v.) og Jónas Signarsson á Crew.fo*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í hesi greinini greiða Karl Christiansen, marknaðarleiðari og Jónas Sigmarsson, stjóri hjá Crew.fo frá, hvussu ES-borgarar, sum komnir eru higar til lands at arbeiða, verða viðfarnir í Føroyum**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyri eini viku síðan høvdu vit grein um viðurskiftini hjá útlendsku arbeiðsmegini, sum komin er til Føroya at arbeiða og sigla undir broyttu útlendingalógini, sum kom í gildi í Føroyum 1. juli.

Greinin bygdi á prát, vit høvdu við teir báðar, Karl Christiansen, marknaðarleiðara og Jónas Sigmarsson, stjóra á Crew.fo

Í samrøðuni vístu teir á, hvussu truplar umstøðurnar hjá ES-borgarum í Føroyum eru undir broyttu lógini, tí hesir bert kunnu fáa eitt fyribils p-tal. Hetta p-tal gevur teimum ikki rætt til at fáa adressu í Føroyum, sum aftur merkir, at teir ikki kunnu fáa ein kommunulækna, ei heldur lut í teimum skipanum, sum teir annars eiga at fáa lut í, meðan teir eru og virka her.

Hinvegin eru hesi arbeiðsfólk og sjófólk limir í avvarðandi fakfeløgum í Føroyum og rinda øll áløgd gjøld, eitt nú skatt, ALS og barsilsgjald, sum skipanin áleggur øllum løntakarum í Føroyum.

Við arbeiðs-og uppihaldsloyvi, bústaði og p-tali høvdu teir verið tryggjaðir minstuløn, tá talan er um sjófólk, og teimum hevði eisini verið tryggjaður sjómansskattur og annars ein røtt viðferð í skipanini sum heild.

### Bíða eftir dønum

Tann stóri trupulleikin hjá hesum fólkum er, at tað tekur so langa tíð hjá Udlændingeservice at viðgera teirra umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Fyrr enn tann viðgerðin er liðug í Danmark, fáa teir ikki tað sonevnda og forjáttaða "klistrimerkið" í passið frá løgregluni, sum aftur gevur teimum rættin alment at búseta seg í Føroyum.

ES-borgarar, sum forhondsgóðkendirarbeiðsgevarar taka higar til lands at arbeiða – antin tað er uppi á landi ella umborð á føroyskum skipum – sleppa til arbeiðis beinanvegin, men tað eru soleiðis tey írestandi viðurskiftini, sum ikki koma upp á pláss, fyrr enn viðgerðin hjá Udlændingeservice er liðug, og løgreglan hevur staðfest teirra arbeiðs-og uppihaldsloyvi í passinum.

Sum forhondsgóðkendur arbeiðsgevari er tað uppgávan hjá Crew.fo at útvega reiðarumogarbeiðsgevarum annars fólk, har tørvur er á tí, men av moralskum ávum hevur felagið eisini roynt at hjálpt reiðarunum í stríðnum at vinna sømdir og rættvísi til hesi fólk.

Men hetta hevur higartil verið ein tungur burður, og enn røkist einki fyri, at viðurskiftini koma í rættlag, soleiðis at Udlændingeservice kemur til at avgreiða tær mongu umsóknirnar, sum liggja í Danmark til viðgerð og avgreiðslu.

- Vit lótu okkara fyrstu umsóknir eftir broyttu lógini inn longu 6. august í ár, men enn hevur eingin teirra fingið svar upp á nakað sum helst. Tað er góðkenningin hjá Udlændingeservice, sum gevur hesum fólkum nøktandi viðurskifti, men hetta tekur bara so ógvuliga langa tíð.

Karl Christiansen og Jónas Sigmarsson skera út í papp og siga, at tað er ikki fyrr enn henda góðkenning (AR8) er komin aftur úr Danmark, at útlendsku arbeiðsfólkini eftir broyttu lógini kunnu flyta sína adressu til Føroya, soleiðis at tey kunnu virka undir vanligum viðurskiftum eins og okkara egnu borgarar.

- Vit hava roynt at fregnast eftir, hvat kanska fer at henda, so korini hjá hesum fólkum í Føroyum kunnu batna, men svarið, vit higartil hava fingið í Føroyum, er, at best man vera at trýsta á donsku Udlændingeservice fyri at fáa tey at viðgera umsóknirnar skjótari.

Teir halda, at hetta bara er ein léttur máti hjá føroyskum myndugleikum og stovnum at sleppa sær undan ábyrgd.

### Mugu taka okkum saman

- Øll, sum hava tikist við útlendingamál í Føroyum, vita, at Udlændingeservice ikki letur seg trýsta. Tey siga, at tey eru nógv undirmannað – og at viðgerðin